

## Leyst starv

**Málsviðgeri til barna- og ungdómsdeildina**

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir málsviðgera til barna- og ungdómsdeildina.

Umsóknarfreist: Mánadagin 8. mai 2006.

Setanarviðurskifti: Starvið er fulltíðarstarv og verður sett eftir avtalu. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita við at venda sær til Janus Isfelt, deildarleiðara, tlf. 302010.

**Les meira um starvið á www.torshavn.fo/leysstorv**

www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**

## HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN

*SERSTOVNADEILDIN*

# Pedagogur til Verkætlan

Í samband við, at Heimarøktin og Serforsorgin fer undir eina verkætlan, verður søkt eftir pedagogi til setan 1. mai 2006, ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

**Starvið**
Talan er um eina verkætlan, har ein persónur fyrst í 20'unum, sum hevur autismu, skal flyta heimanífrá, og læra at skipa sín gerandisdag í egnari íbúð og við føstum arbeiði so sjálvstøðugt sum gjørligt. Í verkætlanini koma ætlandi at starvast 6 fólk í einum toymi.

Tín uppgáva verður, umframt at virkað sum stuðul í gerandisdegnum, at verða kontaktfólk í verkætlanini. Hetta inniber, at tú verður bindiliðið í samskiftinum ímillum starvsfólkini í toyminum, og í samskiftinum ímillum toymi, avvarðandi, leiðslu og brúkaran.

Toymið skal í felag leggja til rættis og skipað gerandisdagin bæði praktiskt og fakliga. Øll størvini í verkætlanini vera tó bygnaðarliga skipað undir eini av verandi stovnsleiðslum undir Serstovnadeildini.

**Førleikakrøv**
Tú skalt hava útbúgving sum pedagogur ella aðra líknandi útbúgving. Ynskiligt er at tú hevur ávísa servitan um autismu, men hetta er ikki nakað krav.

Tú mást vera sálarliga væl fyri og kunna taka eina professionella støðu og halda fast við hesa. Tú mást hava góð eygleiðingarevnir, og duga væl at skipa og brúka tínar eygleiðingar í sambandi við menning av tilboðnum. Tú mást duga væl at samskifta og hava evni til at motivera fólk uttan um teg.

Annars vænta vit at tú ert sinnað/ur støðugt at luttaka í relevantari eftirútbúgving, og annars hevur áhuga í støðugt at dagføra tína fakligheit, so hon allatíðina samsvarar við nýggjastu vitanina innan økið. Vit bjóða í hesum sambandi fakliga supervisión og fakliga ráðgeving viðvíkjandi autismu.

**Setan og løn:**
Um pedagogur verður settur, verður starvið lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag og er lønt stigini 11 til 18. Annars verður starvið lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið, fáast við at venda sær til Jóanes N. Dalsgaard, deildarleiðara á tlf. 304020

**Umsókn**:
Umsókn við CV og avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Postrúm 3037
Eirargarður 2, 2. hædd
100 Tórshavn

**Freistin at søkja starvið er mánadagin 24. apríl 2006.**


OMEGA 3, 6 OG 9




Sosialurin

DIDA




DERMYN SERUM




"Face lift" á ein natúrligan hátt

SIRI VÆLVERA

DR. JACOBSENSGØTA 18
TÓRSHAVN · 31 66 10




## Sethús í Brekkuni 4, Tórshavn til sølu

Ognin matr.nr. 1002ap, í Brekkuni, Tórshavn er til sølu um hóskandi boð fæst. Grundøkið er 398 kvm. Húsini eru bygd í 1968, og liggja væl fyri við góðum útsýni og í sera friðarligum umhvørvi.

**Í húsunum er:**
**Loft:** Gongd, lítið goymslurúm og tvey kømur.
**Miðhædd:** 115 kvm. Durur/gongd, køkur, stova, hjúnarúm, tvey kømur og baðirúm.
**Kjallari:** Íbúð á uml. 80 kvm. við køki, stovu, hjúnarúm, lítið kamar inn av stovuni, gongd/durur og baðirúm. Harafturat er vaskikjallari við oljufýr inni. Inn av durinum er gjørt lítið amboðsrúm.
Bilskúrur (carport) og hjallur. Inngongd til hjallin er inn frá durinum í miðhæddini.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · 100 Tórshavn
Tlf. 311260, fax. 311261
e-mail: ge@lawfirm. fo

Tormóður Djurhuus, adv., Jógvan Páll Lassen, adv., Petur Even Djurhuus, adv., Jógvan E. Ellefsen, adv., Anna Dam, adv., Ingi Højgaard, adv.

## Starvsfólk til Baby & Barnaútgerð

*Ert tú ágrýtin, álítandi og fyrikomandi*

Vit søkja starvsfólk til handil okkara í miðbýnum at byrja seinast 15 mei. Er hetta nakað fyri teg, send okkum eina umsøkn við møguligum viðmælum til:

B & B, Niels Finsensgøta 12, 100 Tórshavn
Att. Mikael Gren



**Tú ert eisini vælkomin at spyrja nærri til starvið á tlf. 515101 ella 319892**

B&B Baby & Barnaútgerð
Niels Finsensgøta 12 - Tórshavn - 315101